## Einskiljing og ferðaseðlaprísir



Annita á Fríðriksmørk, tingkvinna fyri Tjóðveldi, vil í fyrispurningi til Jóhan Dahl, vinnumálaráðharra, hava at vita, hvørjar avleiðingar útsagnir hansara í Vinnuvitan kunnu fáa, har hann er endurgivin fyri at siga, at partaeigararnir fáa all sín pening aftur, um tað almenna setir sær fyri at keypa partabrøvini í Atlantsflog aftur. Í øðrum lagi vil hon vita, hvat hetta merkir fyri landskassan og privatu íleggjararnar. Í einum øðrum fyrispurningi til Jóannes Eidesgaard, fíggjarmálaráðharra, spyr Annita á Fríðriksmørk, hvussu áðurnevndi ætlar at minka um kostnaðin av ferðaseðlum á rutunum hjá Atlantsflog, sum hann í útvarpinum hevur sagt vera alt ov dýrar.

# Tænasta ókent fyribrigdi

**Føroyingurin Andrew Hansen kendi seg heilt sleptan upp á fjall, tá hann fáar tímar fyri fráferð við Norrönu fekk at vita, at skipið ikki sigldi til Bergen hendan túrin. Pengarnar aftur ella ferð til Hanstholm og so sjálvur syrgja fyri ferðini víðari, var boðskapurin frá Smyril Line**

TÆNASTA
*Leo Poulsen*
*leo@sosialurin.fo*




*Andrew Hansen saman við konuni, Inger Marie, og fýra ára gamla abbasoninum, Sven-Andrew Vårdal*

*Mynd: Jens Kristian Vang*

Smyril Line hevur verið í tungum sjógvi seinastu tíðina, fyrst og fremst av fíggjarligum ávum. Í so máta valdi landið kortini at bjarga felagnum, og frá 1. januar verður rutan løgd um soleiðis, at Bergen og Skotland ikki longur verða at finna í ferðaætlanini.

Men longu nú knípur við at halda givin lyftir, og tað mátti eitt nú føroyingurin Andrew Hansen, sum í fleiri enn 30 ár hevur búð í Noregi, sannað. Hann skuldi við Norrönu til Bergens seinasta hósdag klokkan 17, men stutt fyri døgurða sama dag varð hann ringdur upp frá Smyril Line við teimum boðum, at Norröna ikki sigldi til Bergens hendan túrin vegna veður.

Hetta kom sjálvandi dátt við hjá Andrew Hansen, sum saman við konuni, Inger Marie Hansen og abbasoninum, fýra ára gamla Sven-Andrew Vårdal, høvdu verið heima í Føroyum og vitja familjuna.

- Eg fregnaðist so um, hvat ið nú var at gera og fekk at vita, at eg kundi fáa peningin fyri ferðina aftur goldna. Men hvat skuldi eg við pengunum í Havn? Tað, sum ráddi um hjá mær, var at sleppa aftur til Noregs, sigur Andrew Hansen.

Hann fekk tó eisini at vita, at ferðaseðilin kundi nýtast til Hanstholm, men tá mátti hann sjálvur syrgja fyri ferðini víðari til Noregs.

### Eingin tænasta

Andrew Hansen er ógvuliga ónøgdur við tænastuna – ella rættari vantandi tænastuna – hjá Smyril Line. Hann heldur ikki, at tað ber til í 2008 at fara soleiðis við fólki.

- Eg bað um at fáa hesi boðini skrivliga, tí eg ætli mær ikki at sleppa málinum uttan víðari. Eg boðaði teimum á Smyrikl Line frá, at eg fór at lata einum sakførara málið, tað havi eg gjørt, og eg bíði nú bara at hoyra aftur frá honum, sigur Andrew Hansen.

Hann sigur, at tað var skrivstovan hjá Smyril Line í Bergen, sum ringdi og segði, at ferðaseðilin var galdandi til Hanstholm, og tey vóru sum so hjálpsom, men søgdu seg kortini ikki kunna útvega ferðaseðil víðari til Noregs við Color Line, og heldur ikki yvir um til Svøríkis við Stena Line, tí Andrew Hansen hevði einki sum so ímóti at koyra úr Svøríki yvir til Moss í Noregi, har hann býr. Men heldur ikki hetta vísti seg at bera til.

Alt hetta endaði so við, at Andrew Hansen sjálvur mátti gjalda tað, tað kostaði at sleppa úr Hanstholm og upp til Moss í Noregi. Og tað er hann ógvuliga harmur um.

- Tað er ov vánaligt, bara at fáa bjóða pengarnar aftur, tí hvat skuldi eg við teimum í Havn? Tað sum umráddi var hjá mær at sleppa aftur til Noregs. Heldur ikki tilboðið um at bíða eina viku fyri at sleppa heim aftur kundi eg brúka til nakað, serliga tí tá eg spurdi, um tey kundu tryggja mær, at Norröna sigldi næstu viku søgdu tey, at tað kundu tey ikki, sigur Andrew Hansen.

### Ikki tað ringt

Hann heldur heldur ikki nógv um undanførsluna, at veðrið var so ringt.

- Eg setti meg í samband við versonin, sum arbeiðir á einum boriplattformi, og hann kundi siga mær, at veðrið ikki var tað ringt. Tað var faktisk nógv verri, tá vit fóru av Bergen heim til Føroya, sigur Andrew Hansen.

So saman um tikið heldur hann, at tað í allar mátar hevur verið undir allan kritikk soleiðis, sum tey hava verið viðfarin av Smyril Line.

- Nú gevist Norröna so at sigla til Bergens, og tað skilji eg ikki heilt, tí hon hevur verið á tremur við ferðafólki í hvussu er summarhálvuna. Men sjálvt um hon hevði hildið fram at sigla til Noregs, vænti eg ikki, at eg hevði farið við Norrönu aftur, eftir ta viðferð eg havi fingið frá Smyril Line, sigur Andrew Hansen.

# Feilur frá okkara síðu

**- Vit hava fastar mannagongdir at endurrinda avbrotnar ferðir, tá hesar eru byrjaðar. Og at tað er kiksað í hesum førinum mugu vit taka á okkara kappa, sigur Jákup Sverri Kass, marknaðarleiðari á Smyril Line**

TÆNASTA
*Leo Poulsen*
*leo@sosialurin.fo*

Á Smyril Line harmast tey um, at tað eftir øllum at døma er komin einhvør misskiljing í í sambandi við avlýsta túrin til Noregs hjá Norrönu seinasta hósdag.

- Vit plaga at dekka útreiðslurnar, um so skuldi verið, at ein túrur verður avlýstur, eins og í hesum førinum, sigur Jákup Sverri Kass, sølu- og marknaðarleiðari á Smyril Line.

Politikkurin er ein annar, um ferðin ikki er byrjað.

- Um støðan var hon, at viðkomandi ferðamaður skuldi byrja ferðina úr Havn til Bergens seinasta hósdag, og Norröna so ikki sigldi á Bergen vegna veður, so hevði viðkomandi antin fingið bjóðað peningin aftur, ella fingið bjóðað aðra ferð, sigur Jákup Sverri Kass.

Men av tí at Andrew Hansen byrjaði sína ferð í Noregi og tí skuldi heim aftur, er støðan ein onnur, og Smyril Line heldur í slíkum førum tær eyka útreiðslur, ið mátti staðist av, at onnur farleið verður nýtt.

- Vit hava avtalu við Fjord Line um at flyta ferðafólk í slíkum førum, og tí harmast vit um, at tað í hesum førinum er hend einhvør misskiljing, og vit fara at taka stig til at rætta hetta, sigur Jákup Sverri Kass í stuttari viðmerking.



*Jákup Sverri Kass. Hetta mugu vit taka á okkara kappa*